# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:
www.sosialurin.fo

# HB spardi seg til sigurs

*Sandoyingar megnaðu í seinna hálvleiki at hótta HB leiðsluna, men alt í alt mundi heimasigurin vera í lagi, hóast tað er sjónligt, at HB'arnir eru um at gerast moyrir av dystarsrká síni*



*Hóast hann hevði onkrar góðar møguleikar, noyddist Andrew málleysur av vøllinum hesuferð. HB vann tó dystin, og kunnu teir nú halda summarfrí á ovasta plássinum á stigatalvuni*

***Mynd: Álvur Haraldsen***

Jákup Mørk

HB-B71 1-0 (1-0)

Tað var ikki tann stóra áskoðarafjøldin, sum mikukvøldið hevði leitað sær oman í Gundadal, har HB skuldi gera seinasta landskappingardystin undan summarsteðginum av sær.

Um tað var orsakað av, at EM fótbóltur var at síggja í sjónvarpinum, ella tí talan var um eitt ikki serliga áhugavert mótstøðulið, skal ikki vera gitt um her. Hinvegin ber tó itl at staðfesta, atforskotnu dystirnir, sum HB hevur leikt seinastu vikuna, í hvussu hava merkt færri áskoðarar og harvið færri krónur í pengakassan.

**Lág ferð**

Tá dysturin byrjaði, var eyðsæð, at sandoyingar fyrst og fremst vóru komnir til Havnar fyri at halda fast um stigið, sum teir høvdu, tá dysturin byrjaði.

Í útgangsstøði lógu teir rættuliga aftarlaga á vøllinum, fyri so at dúva upp á kvik mótálop, um møguleiki skuldi verið fyri hesum.

HB liðið hevur havt eina sera strævna dystarskraá seinastu tvær – tríggjar vikurnar, og møguliga var tað hetta, sum viðførdi, at teir ongantíð veruliga fingu glið á skjóta spælið, sum annars hevur sermerkt liðið higartil í ár.

Ikki tí, kropsliga eru leikararnir ivaleyst væl fyri, men mentalt er tað nakað torførari at seta seg upp til dyst tvær ferðir um vikuna, heldur enn eina ferð.

HB liðið hevði annars bóltin størsta partin av hálvleikinum, men tá teir ikki megnaðu at seta veruligt trýst á B71, og sandoyingar samstundis lógu aftarliga á vøllinum, kom ongantíð rættulig ferð á spælið.

Tað eydnaðist tó heimaliðnum at leggja seg á odda, tá fyrri hálvleikur var hálvrunnin. Miðskeiðis á sandoyarhálvuni fekk Rúni Nolsøe bóltin. Mótstøðuleikarnir bakkaðu, heldur enn at fara ímóti honum, og so royndi liðskiparin seg við skotið úr 20 metra fjarstøðu. Waldemar (var týðuliga darvaður av skaða) megnaði ikki at halda bóltinum, og so var Bárður Mortansson skjótur at fylgja upp, og sendi bóltin upp undir nettakið.

Var ferðin lág undan málinum, gjørdist hon enn lægri, tað sum eftir var av hálvleikinum. Sandoyingar fylgdu framvegis verjukenda upplegginum, meðan heimaliðið tóktist mest sinnað at varðveita leiðsluna, og tí hendi ikki tað heilt stóra. Nakrar skotroyndir vóru frá báðum pørtum, men annars var so sum so við rættuligum málmøguleikum.

Andrew av Fløtum fekk tó ein gyltan møguleika, tá Jógvan Jón var ósketin og spældu upp á tvørs í verjuni. Hevði Andrew havt ánilsi av, hvussu fríur hann var, hevði hann helst givið sær betri stundir, men hann smekkaði til, og bólturin fór nakað framvið handaru stong.

**Lupu á**

Beinanvegin, sum seinni hálvleikur byrjaði, tóktist greitt, at sandoyingar høvdu fingið onnur boð í hálvleikinum.

Í royndini at bjarga sær stig úr dystinum, fóru teir nú nógv longur fram á vøllin, og hetta setti beinanvegin meira lív í dystin.

Serliga tóktust Eli og Julian á miðvøllinum at vera væl fyri, og teir báðir vóru eisini við í so at siga øllum tí framrættaða spælinum, sum B71 sýndi.

Hetta gav tó eisini meira rúmd til kontraspælið hjá HB, og tað var eisini um reppið, at teir megnaðu at avgera dystin beinavegin í seinna umfarinum, men skallarin frá Jóhannis varð bjargður á sjálvari málstrikuni.

Hevði bólturin farið inn, høvdu gestirnir helst mist alla vón um stig, men ístaðin gjørdust teir nú alt meira álopssinnaðir, og innan fáar minuttir, høvdu teir havt einar tríggjar rættuligar hóttanir á HB málið, sum kortini allar endaðu úrslitaleysar.

Í hinum endanum hevði Andrew enn ein góðan møguleika, tá hann varð spældur leysur høgrumegin í brotsteiginum, men hann skuldi absolutt leggja bóltin til vinstrabeinið, og so eydnaðist tað Waldemar at koma út at blokka.

Størsta møguleikan mundi Alex Nielsen tó fáa, tá hann fekk eina langa sending. Tað eydnaðist honum at renna verjuna av og at sneiða út um Bárð, sum kom ímóti honum, men tá hann úr spískum skuldi geva bóltin seinasta sparkið, eydnaðist tað kortini Hans á Lag at tveita seg niður og verja út til hornaspark.

**Undirhaldandi hóast alt**

Sum heild var seinni hálvleikur nakað væl meira undirhaldandi enn fyrstu trý korterini. Einamest orsakað av, at sandoyingar tá høvdu tveitt virðingina fyri borð, tí teir nú vóru noyddir at gera mál.

Møguliga var tað tatiskt skeivt, at teir ikki nýttu hesa spæliætlan beinanvegin, men hinvegin er spurningurin eisini, um teir høvdu megna at trýst HB liðið allan dystin

Unga HB liðið, sum annars hevur staðið fyri nakað av tí mest positiva fótbóltinum higartil í kappingini, tykist í løtuni darvað av strævnu dystarskránni. Danir hava eitt hugtak, sum teir nevna »økonomi fótbólt«, sum helst best kann umsetast til orkusparandi fótbóltur. Um tað er tilvitað ella ikki, skal ikki gitast um her, men í øllum førum tykist HB at hava spart upp á orkuna í seinastu dystunum, sum teir hava spælt. Í øllum førum tykist tað púra vist, at ferðin á spælinum skal minst eina tonn upp, um teir ætla sær at vinna steypafinaluna, sum verður næsti dystur teirra á føroyskari mold.

Tað skal tó leggjast afturat, at strævna skráin, sum HB hevur havt seinastu dagarnar, væl kann gerast ein fyrimunur hjá teimum í seinasta enda. Hóast alt hava teir fingið fulla úrtøku í landskappingini hesar dystirnar, meðan tað væl kann hugsast, at KÍ og B36 koma at hava tað strævið í heyst, orsakað av altjóða uppgávunum.

B71 hevur nú tvær ferðir á rað sýnt, at tá nakað av varseminum verður tveitt fyri borð, kunnu teir spæla fult upp til flestu av hinum liðunum í fyrstu deild.

Útidystir móti NSÍ og HB ljóða kanska torførir á pappírinum, men í Runavík mundu teri farið avstað við øllum trimum, og í Havn kundu teir lættliga fingið annað stigið. Í báðum førum grundað á meira framrættaðan fótbólt seinna umfarið av dystinum.

Møguliga skulu teir bert trúgva meira upp á egin evni. At tilfarið er til meira, stigatalvan í løtuni sýnir, tykist í øllum førum vera púra greitt.

**HB-B71 1-0 (1-0)**

1-0: Bárður Mortansson 23.

Dómari: Lassin Isaksen

**HB:**

Bárður Johannesen – Jóhannis Joensen, Hans á Lag, Símun Eliasen, Janus Joensen – Hallur Danielsen, Rúni Nolsøe, Rói Árting, Pætur Dahl – Bárður Mortansson, Andrew av Fløtum

**B71:**

Waldemar Nowicki – Jógvan Jón Petersen, Ib Mohr Olsen, Bergleif Brimvík – Høgni Hansen, Kári Nielsen, Eli Hentze, Julian Florescu, Jákup Lamhague – Alex Nielsen, Michael Sørensen

**Støðan, 1. deild menn**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 10 | 7 | - | 2 | - | 1 | 21 | 10 | 11 | 23 |
| 2 | B36 | 9 | 6 | - | 0 | - | 3 | 30 | 13 | 17 | 18 |
| 3 | VB | 9 | 5 | - | 3 | - | 1 | 19 | 13 | 6 | 18 |
| 4 | B68 | 9 | 6 | - | 0 | - | 3 | 20 | 15 | 5 | 18 |
| 5 | KÍ | 9 | 5 | - | 2 | - | 2 | 25 | 7 | 18 | 17 |
| 6 | NSÍ | 9 | 2 | - | 3 | - | 4 | 18 | 17 | 1 | 9 |
| 7 | GÍ | 9 | 2 | - | 2 | - | 5 | 14 | 19 | -5 | 8 |
| 8 | B71 | 10 | 2 | - | 2 | - | 6 | 9 | 15 | -6 | 8 |
| 9 | Sumba | 9 | 2 | - | 0 | - | 7 | 6 | 39 | -33 | 6 |
| 10 | FS Vágar | 9 | 1 | - | 2 | - | 6 | 9 | 23 | -14 | 5 |



# Toppurin gerst breiðari

*3. deild: AB hevur tapt tvær ferðir, og B36 megnaði ikki at manna lið, tá teir skuldu spæla í Vági*

Tað er okkurt, sum bendir á, at kappingin um fremstu plássini og harvið eisini um møguleikan at flyta upp, fer at verða meiri spennandi, enn tað sá út til at gerast, tá sjey umfør vóru fingin frá hondini.

Tíverri høvdu vit í síðstu viku ikki umstøður at hava umrøðu í blaðnum eftir 8. umfar. Nú taka vit afturíaftur, og vit kunnu staðfesta, at summi lið hava fingið luft undir veingirnar, meðan tað hjá øðrum er meiri ella minni steðga upp.

Mest merkisvert er tað, at trý lið, sum øll hava møguleika at flyta upp – Skáli, B71 og VB – hava tikið seg fram móti AB og B36, sum tey fyrstu sjey umførini tóktust vera púra einsamøll í kappingini um gullkrónurnar.

At hesi trý liðini eru komin tættari at uppflytingarmøguleikanum kemst m.a. av, at bæði B36 og AB hava mist tær báðar seinastu vikurnar. B36 vann spennandi toppuppgerðina móti AB í Gundadali 2–1. Tá B36 so skuldi fara suður til Vágs, megnaðu teir ikki at manna lið, og so sendu teir avboð. Hetta er sjálvandi lítið sømiligt. VB hevur fingið tey trý stigini við málmuninum 0–0. Sambært skipanini skulu B36 og VB spæla í Gundadali 2. september. Reglarnir siga, at tá lið ikki møtir á útivølli, skal hin dysturin spælast á vøllinum, har útiliðið ikki møtti. Tað vil við øðrum orðum siga, at B36 skal til Vágs 2. september.

AB vann í 9. umfarinum 8–4 á Argjum móti TB. Sambært skránni skuldu argjamenn spæla í 10. umfarinum á heimavølli móti B71 komandi sunnudag. Men dysturin varð framskundaður til síðsta týskvøld. Ivaleyst mundu teir í AB rokna við at vinna tey trý stigini. Ikki minst tá teir í steðginum vóru á odda 2–1. Tveir minuttir undan steðginum varð ein sandoyingur rikin av vøllinum. Men B71 megnaði at javna til 2–2, tá seinna umfarið var tíggju minuttir gamalt. Merkisvert var tað, at AB gjørdi sjálvmál til 0–1 og eisini til 2–2! Fram móti dystarenda royndu teir í AB at fáa sigursmálið, men í staðin skoraði B71 tvær ferðir!

Skálamenn tykjast av álvara at hava fótað sær. Í fyrstu umførunum var úrtøkan hjá teimum sera soltin, men nú hava teir fingið nógv stig. Sigurin á B71 var sannførandi, og teir vunnu á Tvøroyri, sjálvt um teir í meiri enn ein hálvan tíma vóru aftanfyri 1–0. Tað hjálpti væl, at TB var undirmannað síðsta hálva tíman.

Tað varð ikki roknað við, at ÍF skuldi standa seg so vánaliga, sum teir higartil hava gjørt. Fuglfirðingar hava tapt tvær tær síðstu ferðirnar, og nú eru teir einsamallir á aftasta plássi.

KÍ hevði í fyrstu umførunum okkurt brúkiligt úrslit á heimavølli. Tað tóktist sum um kiksarin á Argjum, tá klaksvíkingar vóru illa fyri við fólki, ikki fór at endurtaka seg, men nú hevur verið illa statt tvær ferðir. Á norðoyarstevnu móti TB var ikki gott, og tá KÍ næstsíðsta sunnudag var á Sandi, var heilt galið. B71 vann 18–0, og eitt sovorðið úrslit eigur ikki at verða góðkent í einum stórum felag.

Klaksvíkingar hava havt sítt stríð av 3. deildarliðnum í fleiri ár. Úrslitið á Sandi eigur at fáa teir at spyrja seg sjálvar, um tað ikki hevði verið best fyri allar partar, um liðið flutti niður.

Ein av ungu spælarunum hjá B71, Kristoffur Vidtfeldt, nýtti høvi móti veika KÍ liðnum til at gera eitt orduligt lop á málskjúttaralistanum. Í ein lítlan hálvan tíma skoraði hann fimm tey fyrstu málini, og í 2. hálvleiki var hann aftur tvær ferðir á blettinum.

Merkisvert var tað, at Torkil Nielsen var millum málskjúttarnar, tá FS Vágar var í Klaksvík. Tað hevði kanska verið eitt hugskot hjá ferðavinnuni, at tey fylgdu við í, nær 3. deidlarliðið hjá FS Vágum spælir. So kundu tey skipað soleiðis fyri, at fótbóltshugarðir ferðamenn fingu høvi á vølli at síggja tiltikna málskjúttan frá Landskrona dystinum móti Eysturríki!

JH

**Úrslit**

**8. umfar – 10. juni**

**FS Vágar–ÍF 4–3 (3–1)**
1–0: Magnus Simonsen 5.
2–0: Ingi Joensen 17.
2–1: Ken Bærendsen 18.
3–1: Magnus Simonsen 43.
3–2: Ken Bærendsen 43.
3–3: Martin Hansen 50.
4–3: Eyðfinn Davidsen 65.

**B68–VB 2–3 (1–2)**
1–0: Jákup Olsen 18.
1–1: sjálvmál 23.
1–2: Egil Steintórsson 30.
2–2: sjálvmál 57.
2–3: Niclas Ludvig 61.

**B36–AB 2–1 (0–0)**
1–0: Sigfríður Clementsen 50.
1–1: Svenning W. Hansen 52.
2–1: Brynleif Hansen 85.

**TB–Skáli 1–4 (1–1) 12. juni**
1–0: Mortan Enni 6.
1–1: sjálvmál 38.
1–2: Sveinur Justinussen 47.
1–3: Hans Christian Djurhuus 65.
1–4: Marius Joensen 81.
Reytt kort: Eyðun Svalbard, TB, 60.

**B71–KÍ 18–0 (8–0)**
1–0: Kristoffur Vidtfeldt 8.
2–0: Kristoffur Vidtfeldt 22.
3–0: Kristoffur Vidtfeldt 25.
4–0: Kristoffur Vidtfeldt 27.
5–0: Kristoffur Vidtfeldt 33.
6–0: sjálvmál 35.
7–0: Mourits Viderø 37.
8–0: Símun Hansen 43.
9–0: Símun Hansen 46.
10–0: Kristoffur Vidtfeldt 53.
11–0: Jóhan West br 62.
12–0: Eirikur Poulsen 65.
13–0: Kristoffur Vidtfeldt 71.
14–0: Eirikur Poulsen 75.
15–0: Jónsvein Thomsen 77.
16–0: Jónsvein Thomsen 78.
17–0: Torbjørn Jensen 87.
18–0: Torbjørn Jensen 88.
Reytt kort: Roy Baldvin, KÍ, 80.

**9. umfar – 18. juni**

**KÍ–FS Vágar 5–7 (1–4)**
0–1: Petur Niclasen 4.
0–2: Petur Niclasen 35.
0–3: Torkil Nielsen 37.
1–3: Bogi Isaksen 38.
1–4: Eyðfinn Davidsen 39.
2–4: Karsten Hansen 47.
3–4: Allan Poulsen 51.
3–5: Petur Niclasen 53.
4–5: Torleif Eyðun Poulsen 56.
4–6: Ingi Joensen 60.
4–7: Petur Niclasen 75.
5–7: Torleif Eyðun Petersen 82.

**ÍF–B68 1–5 (0–3)**
0–1: Jákup Olsen 16.
0–2: Aksel Højgaard 22.
0–3: Pól Knút Davidsen 30.
0–4: Aksel Højgaard 50.
1–4: Ken Bærendsen 85.
1–5: Aksel Højgaard 89.

**VB–B36**
B36 møtti ikki

**AB–TB 8–4 (4–2)**
0–1: Kaj Roest 7.
1–1: Signar Johannesen 21.
2–1: Signar Johannesen 24.
2–2: Jens R. Sørensen 25.
3–2: Heri Petersen 31.
4–2: Svend Poulsen 45.
5–2: Signar Johannesen 47.
6–2: Bárður Johannesen 53.
7–2: Svenning W. Hansen 54.
7–3: Hallur Christiansen 56.
7–4: Hallur Christiansen 68.
8–4: Svend Poulsen 78.

**Skáli–B71 7–2 (4–0)**
1–0: Pauli Hansen 6.
2–0: Jón Rasmussen 13.
3–0: Pauli Hansen 16.
4–0: Pauli Hansen 30.
5–0: Jón Rasmussen 46.
5–1: Kristoffur Vidtfeldt 49.
5–2: Jónsvein Thomsen 56.
6–2: Kaysten Rasmussen 72.
7–2: Kaysten Rasmussen 78.

**10. umfar 20. juni**

**AB–B71 2–4 (2–1)**
(Framskundaður frá 25. juni)
0–1: sjálvmál 5.
1–1: Fróði Stenberg 27.
2–1: Signar Johannesen 43.
2–2: sjálvmál 55.
2–3: Jónsvein Thomsen 86.
2–4: Rúni Joensen 90.
Reytt kort: Petur Kristian Nielsen, B71, 43.

**Støðan, 3. deild menn**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | AB | 10 | 7 | - | 0 | - | 3 | 46 | 22 | 24 | 21 |
| 2 | B36 | 9 | 7 | - | 0 | - | 2 | 27 | 6 | 21 | 21 |
| 3 | Skála | 9 | 5 | - | 1 | - | 3 | 24 | 18 | 6 | 16 |
| 4 | B71 | 10 | 5 | - | 0 | - | 5 | 36 | 28 | 8 | 15 |
| 5 | VB | 9 | 5 | - | 0 | - | 4 | 23 | 31 | -8 | 15 |
| 6 | B68 | 9 | 3 | - | 2 | - | 4 | 26 | 21 | 5 | 11 |
| 7 | TB | 9 | 3 | - | 2 | - | 4 | 34 | 32 | 2 | 11 |
| 8 | FS Vágar | 9 | 3 | - | 1 | - | 5 | 23 | 25 | -2 | 10 |
| 9 | KÍ | 9 | 3 | - | 0 | - | 6 | 22 | 62 | -40 | 9 |
| 10 | ÍF | 9 | 2 | - | 0 | - | 7 | 19 | 35 | -16 | 6 |

**Máltindurin:**

| | | |
|---|---|---|
| Signar Johannesen | AB | 11 |
| Kristoffur Vidtfeldt | B71 | 11 |
| Oddbjørn Joensen | AB | 9 |
| Aksel Højgaard | B68 | 8 |
| Petur Niclasen | FS Vágar | 8 |
| Kaj Roest | TB | 8 |
| Egil Steintórsson | VB | 8 |
| Svend Poulsen | AB | 6 |
| Kári í Lágabø | VB | 6 |
| Pauli Hansen | Skála | 5 |
| Eyðun Svalbard | TB | 5 |
| Hallur Christiansen | TB | 5 |

# Jóansøka

*60 bátsmanningar hava boðað frá luttøku á jóansøkuróðrinum*

Jákup Mørk

Bæði á norðoya- og eystanstevnu var samlaða talið av bátum 57, so talan er um 3 nýggjar ba´tar.

Í mun til seinasta róður, á eystanstevmu, er talan um tríggjar nýggjar bátar, og eru hesir 8-mannaførini, Ørvur og Junkarin, meðan Suðringur er komin afturat í róðrinum hjá 10-mannaførunum. Hinir bátarnir eru teir somu.

**Sama skipan**

Annars verður skipanin við at nýta seinasta FM-róðurin sum grundarlag framvegis nýtt, tá bátarnir verða lagdir.

Sostatt verðavinnandi bátarnir frá eystanstevnu lagdir í miðjuna, meðan nr. 2 og 3 eru hvør sínu megin vinnara.

Nianfyri prenta vit raðfgylgjuna á jóansøku, eins og støðuna í FM-kappingini.

**5-mannafør, dreingir**

1 Blikur
2 Spógvin
3 Sílið
4 Drekin
5 Tjaldrið
6 Kollur
7 Havfrúgvin
8 Royndin Fríða
9 Báran
10 Junkarin

**Støðan**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Tjaldrið | 14 |
| 2 | Kollur | 9 |
| 2 | Havfrúgvin | 9 |
| 4 | Drekin | 7 |
| 5 | Sílið | 4 |
| 6 | Royndin Fríða | 2 |

**6-mannafør, kvinnur**

1 Lómur
2 Gongurálvur
3 Fuglfirðingur
4 Jarnbardur
5 Páll Fangi
6 Hvessingur
7 Sólmundur
8 Riddarin

**Støðan**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Jarnbardur | 14 |
| 2 | Fuglfirðingur | 8 |
| 2 | Hvessingur | 8 |
| 4 | Páll Fangi | 5 |
| 4 | Gongurálvur | 5 |
| 6 | Sólmundur | 3 |
| 7 | Riddarin | 1 |

**5-mannafør, gentur**

1 Dúgvan
2 Bylgjan
3 Blikur
4 Royndin Fríða
5 Havfrugvin
6 Drekin
7 Ørnin
8 Frúgvin
9 Tjaldrið
10 Hvassi
11 Sílið
12 Beinta
13 Súlan
14 Firvaldur
15 Spógvin
16 Junkarin

**Støðan**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Frúgvin | 14 |
| 2 | Ørnin | 8 |
| 3 | Tjaldrið | 5 |
| 3 | Hvassi | 5 |
| 3 | Drekin | 5 |
| 3 | Beinta | 5 |
| 7 | Sílið | 1 |

**6-mannafør, menn**

1 Snopprikkur
2 Sólmundur
3 Strálan
4 Hvessingur
5 Hósvíkingur
6 Gongurálvur
7 Kollfirðingur

**Støðan**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Hvessingur | 14 |
| 2 | Hósvíkingur | 10 |
| 3 | Strálan | 7 |
| 4 | Gongurálvur | 5 |
| 4 | Kollfirðingur | 5 |
| 6 | Sólmundur | 3 |

**8-mannafør, menn**

1 Ørvur
2 Knørrur
3 Kvívíkingur
4 Húsavíkingur
5 Gullbrandur
6 Argjabáturin
7 Toftabáturin
8 Nevið Reyða
9 Miðvingur
10 Oyndri
11 Heiðabáturin
12 Víkarbáturin

**Støðan**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Argjabáturin | 14 |
| 2 | Toftabáturin | 10 |
| 3 | Gullbrandur | 7 |
| 3 | Nevið Reyða | 7 |
| 5 | Húsavíkingur | 2 |
| 5 | Oyndri | 2 |
| 7 | Miðviingur | 1 |
| 7 | Kvívíkingur | 1 |

**10-mannafør**

1 Vágbingur
2 Vestmenningur
3 Nólsoyingur
4 Havnarbáturin
5 Eysturoyingur
6 Kjølur
7 Suðringur

**Støðan**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Nólsoyingurin | 11 |
| 1 | Vestmenningur | 11 |
| 3 | Havnarbáturin | 10 |
| 4 | Eysturoyingur | 6 |
| 5 | Vágbingur | 4 |
| 6 | Kjølur | 1 |
| 6 | Klaksvíkingurin | 1 |